TING-HELLAN

# Eisini hjá Stalin-umb er tíðin komin at

**Che Guevara var kanska kynsøsandi, eitt hetjuoffur, enntá hugsjónarligur. Hann var eisini ein verji hjá Jósef Stalin og ein massamordari**

TINGHELLUKRONIKK
*Agga Niclasen*



*attitude@niclasen.fsnet.co.uk*

Eg havi verið – hvat? – 16 ára gamal, tá ið Berlin-múrurin fall. Nei, eg havi og kundi aldri verið »vinstrasinnaður«, men tíðin aftaná kommunistiska fallið – har eg av álvara gjørdist politiskt vitandi og royndi at liva meg inn í hví vaksin fólk ofta høvdu heilt ymiskt politiskt tilknýti – var, ikki bara løgin, men hugfangandi.

So, hjá einum politiskt áhugaðum tannáringi við siðvenjuligum vinstrasinnaðum virðum hevur tíðin aftaná kommunistiska fallið, 90'ini, helst verið sum at verið føddur inn í eina familju, har onkur sera týdningarmikil júst var deyður og tikið við sær túsund loynimál. Tannáringurin kendi ikki farna skyldfólkið, og í øllum tí hann las vísti skyldfólkið seg at vera eitt satt skrímsl; men næstan eingin vildi tosa um tað. Hvussu kundu fólk til vinstru á nú avoldaða politiska ásanum – sum í dag tykjast vera plágað av teim málum, vælsignaði tannáringurin og eg leggja lag í: mannarættindi, alheimsligt fátækradømi, harðræði, gjøgnumskygni og pro-aktivt politiskt rættsemi (fyri m.a. at støðga homofobiskum kreftum og hevja rættindi teirra samkyndu) – einaferð hava verið stuðlaskiparir fyri hesum?

The Black Book of Communism, ein sinnilig og yvirhøvur gløggskygd akademisk greining ritstjórnað av professara Mark Kramer, prógvar við skjølum hvussu meira enn 100 milliónir fullkomiliga ósekir persónar – ikki mannalív, men menniskju – vórðu slaktaði av kommunismuni í 20. øld; meiri enn sjálv fasisman. Og tess meira tú lesur um í hvønn mun vinstravongurin var samsekur í hesum, minni skilur tú.

At kalla alt George Bernard Shaw, til dømis, skrivaði um, var andvekjandi. Kortini, at kalla alt hann skrivaði um Sovjettsamveldið hjá Stalin bar á brá av lifran og mjúkrendari lovprísan. Tað sama er galdandi fyri H. G. Wells, Sidney og Beatrice Webb, Bertolt Brecht … og listin yvir gávað, hugkveikjandi vinstrasinnað fólk, sum – at síggja til, fullkomiliga óvoldað – gjørdust umberarir fyri tey ræðuligastu og mest blóðtystu harðræðini í tjúgundu øld, er langur.

Jú, eg eri væl varugur við at har eisini er ein føroyskur ein; ein listi, væl at merkja. Tað er bara tað at »tann føroyski listin«, listin yvir føroyskar umberarar – har, og vandaliga vald, Árni Dahl sum fyrrverandi útgevari av stalinistiska Fríu Føroyum, Arnbjørn R. Thomsen sum fyrrverandi formaður fyri góðvarna og ódámliga Felagið Føroyar-Kuba og Oddvør Johansen sum, ja!, Oddvør Johansen sýna seg – kann illa leggjast undir at vera »gávaður« ella »andvekjandi«. So, hvussu?

Eingin tykist at kunna svara hesum. Tey høgrasinnaðu hevda, sjálvandi, at søgan avdúkar vinstravend sum tey í grundini eru: 'tyrannisk'! Men hetta tykist mær fjákut; pedagogar, tey í hjálparfelagsskapum, sosialráðgevar, tey í Tvøroyri og starvsfólkið hjá Sosialinum eru valla tyrannar í væntu. Men heldur ikki tey vinstrasinnaðu eru før fyri at veita nøktandi svør. Tey hava ikki enn latið kommunistisku søguna sær lynda. Um so var – um vinstravend veruliga høvdu játtað – íðan, tá høvdu tey ikki farið við skammleysum umberarum fyri Sovjettsamveldið, Kuba og Ernesto Guevara sum javnmett og við várkunnsamum eftirlæti. Um so var, so høvdu siðilig vinstravend lítilsvirðað umberarirnir, hildið lítið um umberarirnir … hugt niður á teir.

Hygg, til dømis, at søgufrøðinginum Eric Hobsbawm – enn er hann, á vinstravonginum, at meta við eina vituga rokkstjørnu; hansara bøkur verða leptar og svølgdar rátt; hansara fyrilestrar eru stappaðir av hugsjónarligum ungdómi við øllum teim røttu áskoðanunum. Kortini, so er Hobsbawm vorðin verandi ein óumberandi verji hjá stalinismuni. Hann hevði, um bert biðin, »við gleði njósnað vegna Stalin«, segði hann nýliganí—uttan angur. Í síni sjálvsævisøgu greiður Hobsbawm frá at hann »treats the memory and tradition of the USSR with an indulgence and tenderness«. Í hansara 600 síðu langu frágreiðslu av hvussu hann, eitt heilt lív, hevði stuðlað Sovjettsamveldinum og kommunistisku hugsjónunum taldi eg tríggjar – tríggjar! – iðranir ella krímfongdar ávaringar. Tann síðsta er 'typisk' – kanska serliga fyri føroyskar umberarar. Hobsbawm viðmerkir: »I am prepared to concede, with regret, that Lenin's Comintern was not such a good idea«. Hatta fer at vera ein uggi hjá hasum tíggjutals milliónunum, Lenin og hansara fylgisneytar slaktaðu.



**»Um vinstravongurin hevur lært nakað av 20. øld, íðan, so má tað vera tað at spýggjuligi atburðurin hjá teirra siðvenjuliga andstøðufólki ikki gevur vinstravonginum frælsi ella loyvi til at blíva líka spýggjuligur. Vinstravongurin kann ikki loyva sær at bera yvir við »sínum kúllum«; hann kann ikki skúgva fólkaræðisligar setningar til viks so at knúsa fólk, tey vinstravendu meta vera enntá verri.«**

Áh, hví geva so nógv aðramáta siðilig fólk seg í part við einstaklingar sum Eric Hobsbawm? Eg kann ikki annað enn koma til ta niðurstøðu, at tey ikki í álvara hava hugsað um offrini fyri harðræðinum, hann verjir.

Ókey, veruliga orsøkin til at eg gremji meg og forsyndist inn á hetta, at eg skrivi um hetta, júst nú, er orsakað av nýggja filminum The Motorcycle Diaries; filmurin roynir at endurvekja enn eitt stalinistiskt ikon. Che Guevara var kanska kynsøsandi, eitt hetjuoffur, enntá onkursvegna hugsjónarligur. Hann var eisini ein verji hjá Jósef Stalin og ein massamordari. Tað var ikki bert í hendinga førum at Che Guevara, í svakligari tilbiðjan, fall til knígggja frammanfyri myndum av Stalin meðan hann borðreiddi við politiskum pliktanum. Hann talaði fyri »miskunnarleysum haturi fyri fíggindanum, ið [átti] tvingað okkum oman fyri og handan natúrligu avmarkingarnar hjá menniskjanum og gjørt okkum til virknar, harðligar, úrveljandi og kensluleysar drepamaskinur«.

Undir kubansku rakettkreppuni í 1962 var Che stívrendari enn sjálvt Castro ella Khrushchev, eftir øllum at døma óáhugaður í at allur heimurin helt andanum sum hann bíðaði eftir endaliga úrslitinum. »The worst thing I heard about Che«, segði Christopher Hitchens, fyrrverandi sosialistur og núverandi uppíleggingarmaður og tí stórfíggindi hjá øllum sosialistiskum umberarum og islamo-fasistum, »is that he was in favour of launching the missiles«.

Millum hansara meira vanligu gerðir, hvønndagskostur at navni, plagdi Guevara at lumpuskjóta smádreingir—teir hava helst ikki, sambært honum, verið nóg kønir í kommunistisku læruni, sum, bara so tú verður fullkomiliga vitandi um tað, eisini stinkar í 'teoriini': »We blindfolded them and subjected them to the anguish of a simulated firing squad« (Che Guevara, Andrew Sinclair).

Í Kuba – og, synd at siga, aðrastaðni við – er andveiki Che enn, tann dagin í dag, ein kvasidýrlingur og ein ímynd av hvat var og kundi verið í Castro'sa skinklandi státi. Eitt snultisamfelag, spilt av muturi og eini, á allar mátar, oyðileggjandi samfelagslæru. Í Dimmalætting á sinni heitti Arnbjørn R. Thomsen, sáli, vegna Felagið Føroyar-Kuba »rætta« lesaranum um at koma við á – og tú ert vælkomin at flenna – »arbeiðs- og solidaritetsbrigadufer∂ til Kuba«. Men nú skalt tú øtast! »Helst verður eisini høvi at síggja gravstaðið hjá Che Guevara og nøkrum av hansara lagsbrøðrum, sum fullu í Bolivia. Í Kuba hittir tú eitt fólk, sum – hóast ágang og blokadu í fjøruti ár – eru sera fryntlig og fyrikomandi«, skrivar formaður felagsins. Men hetta er á leið líka so villleiðandi sum at hevda at Svøríki hevur langar køir – lygn! – av tí at kona Óla Breckmann keypur ov nógvar skógvar í SMS – ivasamt! – … men at, gakk!, sviar yvirhøvur, tá ið samanum kemur, dáma køir – [ja, tín túrur at gita]! Vissuliga, einans frammanundan skaðiliga góðvarin fólk, samsvarandi við hasi heimkomin frá kibbutz, kunna trúgva slíkum veruleikareingjandi skvaldri … ikki so?

Hvussu er og ikki, so eri eg reyvtroyttur av sleikjandi Che-fjepparum og vamlisliga Kuba-Duba-samhugaðum við tess »tí at øll eru ímóti mær riggi eg ikki«-prædikuni. Men har eru aðrir roynveruleikar, ið muga presenterast, áðrenn tú verður fullkomiliga sannførdur um, at eg havi rætt. Human Rights Watch – ikki nakað ameriku-stýrt organ, hvat enn skápskommunistar halda – greiðir ár undan ári frá hvussu demokratar, øðrvísihugsandi yvirhøvur og eisini samkynd í túsundatali, hvørt ár, verða eyðmýkt, pínd, dripin og, í besta føri, noydd at søkja annað land at búgva í. Kom nú, vakna! Hetta kann ikki verða nakað at hátíðarhalda – sjálvt Vatikanið og homofobar annars muga taka undir við mær í hesum. Sjálvt amerikanskar »blokadur« klára ikki at elva til eitt sovorðið helviti á jørð; blokadur rena ikki rumparar út av einum bergi.

Og Che? Er hann, aftaná hvat tú nú hevur lisið, kanska ein maður at hátíðarhalda? Hugsaði Torbjørn Jacobsen – ikki vandaliga valdur – kanska um øll hasi óseku menniskjuni sum hann hongdi myndina av Che á veggin á mentamálaráðharraskrivstovuni? Jú, Che bardist ímóti ræðuligum høgrasnaraðum kreftum, ikki minst í Guatemala, har Amerika stuðlaði einum høgravíðgongdum kvetti